# Fekk 43 krónur fyri kg. av aldum toski

**Norskir toskaalarar eru ímóti, at prísreglurnar í Ráfiskalógini eisini skulu fevna um aldan tosk**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*



*Føroyingar ala eisini tosk. Í einum seinni blaði fer Sosialurin at kanna, hvussu gongur við hesum*

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi í Noregi um aldan tosk og um, hvussu gongst við hesi aling, søluni og øðrum viðurskiftum í hesum sambandi.

### Metprísur

Fyri jól fekk norska fyritøkan, Villa Cod Farm, heilar 43 norskar krónur í miðal fyri 12 tons av aldum toski. Fiskurin, sum varð sendur á marknaðin, var avhøvdaður, sløgdur, ísaður og pakkaður í kassar.

Útflutningsfeløgini, Pan Marine og Terra Seafood, seldu fiskin fyri framleiðaran. Fiskurin fór til keyparar í Fraklandi, har hann skuldi etast á nýggjárinum.

Í Noregi verður sagt, at orsøkin til høga prísin, var, at torført var at fáa fatur á villum toski, samstundis sum lítið var til av tøkuførum alitoski.

Toskur, sum vigar meira enn 3 kilo, er tann dýrasti á marknaðinum, og lítið er til av hesum fiski í norsku aliringunum.

- Vit rokna ikki við so høgum prísum aftur, men einar 30 krónur í miðal fyri kilo, vænta vit at fáa, sigur Johan E. Andreassen, Villa Cod Farm.

Hvussu nógv lá eftir hjá alibrúkinum við hesi søluni, veit Johan ikki at siga.

- Hetta hava vit ikki roknað uppá, sigur hann við norsk bløð.

### Toskur og laksur

Villa Cod Farm keypti toskayngulin frá støðini, sum norska Havgranskingarráðið hevur, fyri 13 krónur stykkið.

Í dag hevur felagið 35.000 toskar í aliringum á sjónum. Fiskurin verður væntandi tøkuførur um eitt ár ella so.

- Kemur prísurin á ynguli á sama støði, sum prísurin á laksasmolti, megna vit at framleiða toskin líka so bíliga sum laksin, sigur Johan.

Í Noregi hevur verið frammi at leggja søluna av aldum toski undir prísreglurnar, sum eru galdandi í Ráfiskalógini, men hesum er norski toskaalarin harðliga ímóti.

### Uppskotið fallið

- Tað er bara ein lítil partur av alda toskinum, sum fer út á feskfiskamarknaðin. Tí fer hesin fiskurin ikki at skaða marknaðin fyri villan tosk, sigur hann.

Norska stórtingið hevur atkvøtt um eitt uppskot, sum hevur til endamáls at leggja søluna av alitoski undir prísreglurnar í Ráfiskalógini, men uppskotið er fyribils fallið í tinginum.

# Fiskimálaráðharrin bjóðar høgum harrum til Føroya

**Í samband við fiskivinnustevnuna, sum verður í Runavík um mánaðarskiftið, apríl/mai, hevur nýggi fiskimálaráðharrin, Jákup Vestergaard, bjóðað fleiri týðandi monnum til Føroya**

INNBJÓÐING
*Vilmund Jacobsen*

Innbjóðingin er send, men enn eru eingi svar komin uttan úr heimi.

Tað ljóðar næstan, sum ein apríl-søga, men sonn er hon; tað er vist.

Nýggi fiskimálaráðharrin, Jákup Vestergaard, hevur bjóðað fleiri týðandi monnum til Føroya í samband við stóru fiskivinnustevnuna, sum verður í Runavík í døgunum, 29. apríl til 1. mai.

Jákup hevur nevniliga sent innbjóðing til fiskimálaráðharrarnar í Íslandi, Grønlandi, Noregi, Kanada, Ruslandi og Chili. Haraftrat er fiskivinnukommiserurin hjá ES, Frans Fischler, boðin higar til lands.

Sum skilst, er endaliga skráin fyri fundin, sum ætlandi verður umborð á nýggju Norrønu, 28. apríl, ikki løgd enn.

### Eingi svar

Í Fiskimálastýrinum siga tey, at innbjóðingin nýliga er send, men enn duga tey ikki at siga, hvør fer at taka av henni.

Tá ið fiskivinnustevnan verður, fer nýggja Norrøna at liggja í Saltangará sum hotel-skip. So, karmarnir um hendan fundin, kunnu neyvan verða betur.

Hugsandi er, at Jákup Vestergaard ætlar, at fundurin millum hesar høgu harrar í fyrsta lagi skal snúgva seg um viðurskifti av felags áhuga.

Og hesi viðurskifti kunnu fevna víða, tó í fyrsta lagi um fiskivinnumál.



*Jákup Vestergaard hevur bjóðað fiskimálaráðharrunum í Íslandi, Grønlandi, Noregi, Ruslandi, Kanada og Chili til Føroya. Innbjóðing er eisini farin til ES-kommiseri n í fiskivinnumálum, Frans Fischler*



# Høgni eigur avgerðina

**Løgmaður vísir til Høgna Hoydal at avgera lagnuna hjá nýggja landsantikvarinum. Sum støðan er nú byrjar Steffen Stummann Hansen í starvinum mánadagin**

SETAN
*Heri á Rógvi*



*Steffen Stummann Hansen tekur eftir ætlan við sum landsantikvarur mánadagin, og nógv bendir á, at henda avgerð stendur við.*

Málið um nýggja landsantikvarin hevur higartil kostað einum landsstýrismanni sessin, nógv rok og skriving í bløðunum og nú møguliga samgongusamstarvið.

Hvør verður so stjóri fyri Føroya Fornminnissavn? Mánadagin stendur Steffen Stummann Hansen uttan fyri Føroya Fornminnissavn í Hoyvík klárur at taka við starvinum sum landsantikvarur.

Starvsfólkini á stovninum hava fleiri ferðir gjørt vart við, at tey ikki ynskja, at Steffen Stummann Hansen tekur við starvinum sum landsantikvarur, tí setanin skal ógildast, og søkt eigur at verða av nýggjum.

Somuleiðis hevur Magistarafelagið fleiri ferðir heitt á myndugleikarnar um at ógilda setanina.

Men bólturin liggur hjá Høgna Hoydal, virkandi landsstýrismanni í mentamálum. Hetta ger løgmaður eisini greitt, tá hann verður spurdur um málið.

### Fyrisitingarlig avgerð

Bæði løgmaður, Anfinn Kallsberg, og varaløgmaður vóru staddir í Norðurlandahúsinum á grundlógarráðstevnu mikumorgunin, tá vit fingu fatur á teimum.

Mikumorgunin var Høgni Hoydal ikki heilt liðugur at gjøgnumganga málið, men tað vantaði lítið í, og hann skuldi eftir ætlan vera klárur við einari niðurstøðu seinni mikudagin ella hósdagin.

Løgmaður sigur um málið, at hann við at loysa Annlis Bjarkhamar úr starvi tók eina politiska avgerð, men sjálv starvssetanin var ein fyrisitingarlig avgerð. Ein fyrisitingarlig avgerð fær sjálvsagt nakrar fylgjur, men kann broytast við einari nýggjari fyrisitingarligari avgerð.

Sum støðan er nú kemur Steffen Stummann Hansen til landið mánadagin og tekur við starvinum sum landsantikvarur. Løgmaður vil ikki siga, hvat hann hevur sagt við Høgna Hoydal í sambandi við setanina, og hann vil heldur ikki greitt siga, hvørt hann ynskir og heldur tað vera rætt, at starvssetanin verður ógildað ella ei.

– Eg havi gjørt greitt í skrivinum til Annlis Bjarkhamar, at eg ikki metti, at málið var handfarið nóg væl fyrisitingarliga, og hetta er tað, eg havi at siga um málið, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Ì skrivinum til Annlis Bjarkhamar segði løgmaður millum annað:

»Grundað á gjøgnumgongd av skjølunum í málinum um at seta landsantikvar meti eg, at fleiri viðurskifti eru, sum benda á, at málið er ikki handfarið á nøktandi hátt, og at tað av røttum er sáddur ivi um embætisførslu tína í hesum sambandi.«

Aðra viðmerking vil løgmaður ikki gera, og hann visir á, at málið liggur hjá Høgna Hoydal.

Sjálvur hevur Høgni Hoydal í skrivandi stund heldur ikki tær nógvu viðmerkingarnar í skrivandi stund. Hann vísir á, at Steffen Stummann Hansen er settur, og hetta er einki gjørt við.

Sum støðan er nú bendir alt á, at starvsfólkið á Fornminnissavninum og øll onnur mánadagin mugu finna seg í at fáa ein nýggjan stjóra.

Meira verður væntandi at frætta um málið í Sosialinum í morgin.

# Flat rate í Vestmanna

**Vestmenningar hava sum teir fyrstu fingið møguleikan at nýta flat rate, sum gevur óavmarkaða nýtslu á alnetinum**

ALNET
*Heri á Rógvi*



*Í Vestmanna kunnu tey downloada so galið tey vilja. Og alt verður gjørt loftvegis. Seinni verður hendan tænastan eisini boðin út aðrastaðni í Føroyum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Flat rate er eitt hugtak, føroyingar eftir øllum at døma fara at koma at kenna betri og betri næstu tíðina. Flat rate alnetsamband er eitt hugtak, sum er nógv at hoyra uttanlands, og tað merkir skjótt og fast internetsamband, har goldin verður ein prísur fyri haldið - líkamikið, hvussu nógv verður tikið niður av netinum.

Vestmenningurin vóru teir fyrstu, ið fingu telefonsamband, og tað er tí væl møguliga søguliga rætt, at hesi aftur sleppa at vera pionerar við nýggja alnetsambandinum.

Hetta heldur í øllum førum Rasmus Magnussen, stjóri fyri El og Tele.

Hendan fyritøkan er farin undir at bjóða alnetsamband umvegis fylgisvein, har sloppið verður undan at fara undir jørðina og harvið verður sloppið heilt undan kervinum hjá Føroya Tele.

Tað er eitt sindur síðani, at El og Tele almannakunngjørdi, at teir almannakunngjørda, at teir høvdu gjørt eina avtala, ið gav teimum møguleikan at vera einaumboð fyri framkomna útgerð alnetsamband umvegis fylgisvein. Signalið úr Føroyum verður sent upp til ein fylgisvein og verður tikið niður aftur í Týsklandi.

Hetta er fyrsta ítøkiliga prosjektið, og Rasmus letur sjálvir ógvuliga væl at.

– Nú hava vit valt at royndarkoyra skipanina, og vit ætla at fara at bjóða hetta út aðrastaðni í Føroyum, tá tíðin er búgvin. Higartil hevur alt gingið ógvuliga væl, og fólk læta væl at, sigur Rasmus Magnussen.

Talan er um flat rate samband, sum merkir óavmarkað nýtsla. Higartil hava flest øll við føstum sambandi við alnetið goldið fyri hvørt megabeit, tey hava tikið niður av netinum.

Við flat rate er hendan tíðin farin. Goldin verður ein prísur um mánaðin, og so er bara at surfa, downloada og tjatta so nógv einum lystir.

Vestmenningar skulu gjalda 2.950 kr. fyri at binda seg í hjá El og Tele, og mánaðarligi kostnaðurin er frá 395 til 595 kr. – alt eftir, hvussu nógva ferð, fólk ynskja.

– Hesir prísirnir eru á leið teir somu, sum verða bjóðaðir út í Danmark og aðrastaðni, sigur Rasmus Magnussen.

Sum eitt dømi kunnu vit nevna, at fyri 495 krónur um mánaðin ella 5.940 kr. árliga ber til at download umleið tíggju ferðir skjótari enn vanliga uppringda sambandið. Og tú kanst hála óavmarkað nógv niður av netinum.

Ùtgerðin er ein lítil paraskál – 30 cm í tvørmáti – sum verður fest á húsini, og síðani verður bundin beinleiðis í telduna umvegis eina boks. Neyðugt er eisini við firewall fyri at tryggja. Kostnaðurin fyri ein tílíkan er ógvuliga ymiskur.

### Ikki heilt frítt

Ein kann so freistast til at hugsa, at nú er bara at seta telduna at downloada óendaliga nógv allatíðina, men El og Tele ætlar at avmarka ferðina á ávísum fílasløgum – mp3, filmar osfr.

– Sita fólk og downloada fleiri filmar samstundis, so endar hetta bara við at blokera netið, sostatt mugu vit avmarka, sigur Rasmus Magnussen.